## DAGSINS MEINING

# Fría prosess til prinsippmál

Viðhvørt verða feilir gjørdir av umsiting og s. Soleiðis hevur tað altíð verið, og soleiðis fer altið at verða, har nakað verður gjørt til nyttu. Trupulleikin er, at tá ið so hesir feilir eru gjørdir, so vil umsitingin automatiskt royna at verja tiknar avgerðir, heldur enn at hyggja at, um nú avgerðirnar vóru rættar ella ikki.

Sum er kann man sum meinigur borgari klaga til ymsar klagunevndir. Eisini kunnu starvsfók, ið av órøttum eru uppsøgd, fara rættarinar veg. Hett er ikki nøktandi fyri trygdina hjá skattgjaldarum og alment settum.

Vit hava seinastu árini sæð, at landið hevur verið noytt at gjalda fleiri hundrað túsund krónur í endurgjald til einstaklingar, í samband við óstorsligar uppsagnir. Hette er bert hent, aftaná hesir einstaklingar hava brúkt nógva tíð og nógvan pening uppá sakførarar og rættarmál. Hagtølini síggja ikki pen út, og man kann bert gita sær til, hvussu nógv aldrin sær dagsins ljós, tí at fólk aftra seg við at avseta neyðugu orkuna og ikki at gloyma peningin til at seta seg upp ímóti systeminum. Ella rætt og slætt tí tey orka ikki og megna ikki at fara undir slíkt ódnartak.

Eitt annað átaluvert er, at serfrøðin í landsstýrinum, ið m.a. er sett til at tryggja einstaklingin, eftir øllum at døma hevur medvirkað til feilirnar, uttan at nakað tykist fáa avleiðingar. Kann skattgjaldarin verða vissur í, at prinsipell mál, sum til dømis tá Jákup Mørkøre bleiv reinsaður eftir trimum árum, fáa tær avleiðingar, tað eigur at fáa, so somu brølarar ikki endurtaka seg?

Hví ikki avseta pening á fíggjarlógini til fría prosess í prinsipiellum málum, har skattgjaldarin ella illa viðfarin starvsfólk hava útistandandi við landsstýri ug umsiting. Føroyska umsitingin er sera ung, og tí er stórur mangul uppá fordømi, og nøkur av teimum fordømum, ið eru, eru ikki fyrimyndarlig. Skattgjaldarin hevur viðhvørt ringt at treingja ígjøgnum hjá tænarum sínum, og tænarar skattgjaldarans høvdu verið nógv betri stillaðir, um teir høvdu nakrar prinsipiellar dómar ella semjur at arbeiða út frá.

Frí prosess hevði ikki kostað nógv, tí eftir einari tíð, so høvdu ikki verið so nógv mál eftir uttan fordømi.

Verandi støða, har skattgjaldarin má í rættin fyri egnar pengar og brúka ár av sínum lívi at stríðast fyri sín rætt, fyri at fáa viðhald frá skattgjaldarans tænarum, kann ikki halda fram. Frí prosess til prinsippmál kundi verið ein vegur fram, har skattgjaldarin og illa viðfarin starvsfólk kundu ført sínar sakir til dóms og harvið skapt klár fordømi til vegleiðing hjá skattgjaldarans tænarum at umsita eftir.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Reyðargullið sum hvarv

**Bjarni Petersen**
*F Capp 5.10.03*

Nú man liggur her yviri á F Capp og hoyrir, hvussu man verður hunddálkaður og alment úthongdur, kann eg ikki bara mær at koma við nøkrum viðmerkingum

Út- og Sjónvarp í desperatari roynd at rættvísgera teirra meirjáttan, royna at fáa tað til eina gølu í besta Oyggjatíðinda stíl at vit fingu nakað av vinningsbýti í 98-99, onkur politikari og onnur gloypa helst hesum bita í vón at markera seg fyri at verða afturvald.

Alt stendst av at vit í desperatari roynd at yvirliva dupultflagga Arctic Viking eina styttri tíð.

Nú verður málið vent til at gera okkum smákriminellar lúshundar sum útnytta skattaborgarans pening við at vit í 98-99 deildu okkum vinningsbýti út eftir eitt gott ár, har vit avreiddu fyri 48 mill, hetta eftir 10 sløk ár

Ásannast skal í bakspeglinum at hetta var ikki rætt av tí at vit fingu sanera 7,9 mill, men nevnast skal at aðrir rækjutrolarar fingu fleirfaldað hesa upphædd, ja ein fekk 40 mill.

At gott sá út í 98-99 kann eg prógva við at tríggir rækjutrolarar komu í flotan um hetta mundið, og eitt professionelt felag sum Føroya Fiskasøla keypti 23% av felag okkara fyri 7-8 mill. At so rækjuprísurin beint aftaná fall munandi samstundis sum oljan 3 faldaðist var ikki nakað vit vóru harrar yvir.

Eg kann nevna nøkur fakta viðv. Arctic Viking:

Arctic Viking kom til landið í 1986 sum nýbygningur

Síðan tá eru 16 rækjutrolarar komnir í flotan sum eru antin farnir á húsagang ella seldir áðrenn

Vit hava goldið uml. 230 mill út til lønir í Føroyum, harav er uml. helvtin farin í skatt og rest í umfar í føroyska samfelagnum

Fleiri ferð hava vit havt møguleika at selt skipið við góðum vinningi, men ikki gjørt av berari tjóðskaparkenslu (ella býttheit kann man siga nú)

Vit betaltu 4 mill fyri at keypa kvotu bara í fjør, hetta meðan Nóta og Toskalangfaratrolararnir sum florera í pengum fáa meginpartin av síni kvotu goldna av landinum.

Alt rækjutrolararnir fiska belastar als ikki føroysku frammanundan hart trongdu grunnarnar, og kann tí betraktast sum fremmand valuta, sum summir búskaparfrøðingar (uttan okkara) siga skal gangast við 3.

Nei vit hava als onki at skammast av at fingið 7,8 mill í sanering, tað hava vit goldið fleirfaldað aftur

Vit hava fleiri ferð gjørt vart við vónleysu støðuna hjá rækjuskipunum, uttan at nakar sum helst tingmaður reagerar, men nú tá gøla er, leypa allir upp og siga 'eg segði tað altíð'

Hví gera teir ikki sínar lógir so als ongin misskiljing er, landsstýrið er yvirhonds væl mannað við sakførarum og lógarsmiðum fyri feitar lønir, sum hava lært í eini 20 ár.

Sama er galdandi í línuflotanum har nógvir reiðarar ikki vita síni livandi rá hvat teir skulu gera, tí teir bíða eftir tinginum, sum hevur ein mánað bara at venda sær.

Hetta meðan fiskimálaráðharrin ikki veit hvat hann skal gera, tí hvat hann so ger verður tað brúkt ímóti honum.

Nei land okkara liggur fullstendiga lamið, hvar als onki verdur gjørt við at betra um korini hjá vinnuni, men tíðin gongur til klandur og brigsl.

Hví verdur t.d. ikki arbeitt við at fáa 20% tollforðingina av rárækjum til ES vekk eins og íslendarar og norðmenn fingu ornað bert við einum pennastroki?

Hetta hevði givið okkum 1-2 kr. meir pr. kg = 2 mill pr. ár meir, tað er nógvur peningur tá tað manglar

Hví hoyra vit ikki útvarpi her, tá Íslendarar bjóðaðu sær at senda tey fyri onki 4 ferð um døgnið á 30 min. gjøgnum teirra radiostøð ??

Íslendarin sendir hertil 24 tímar um døgnið til síni.

So man kann siga munur er á prioritering hjá íslendingum og okkara tingi, hetta málið hevur ligið steindeytt í eini sera seintarbeiðandi ella als ikki arbeiðandi nevnd í uml. 8 ár.

Sosialurin
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!

W W W . S O S I A L U R I N . F O

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo
**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

# Einki navn enn men vatnið er føroyskt

**Jógvan Páll í Bartalsstovu hevur handilin Meltic í Norðagøtu, men í frítíðini selur hann føroyskt vatn**

OR&MYND
*Ólavur í Beiti*


*Jógvan Páll í Bartalsstovu í hugnaligu móttøkuni á Nordsøen í Blokhus*

**Danland í Blokhus:** Vit hava ikki góðar stundir at tosa saman sum vit sita í móttøkuni á Danland hotellinum í Blokhus, tí Jógvan Páll í Bartalsstovu skal skjótt avstað — hann skal heim til Føroyar við Norrønu. Jógvan Páll í Bartalsstovu hevur handilin Meltic í Norðagøtu men nú hevur hann verið eina viku í Danmark og ørindini hava verið at selt føroyskt vatn.

Keldan, sum góðu dropparnir koma úr, er í haga hjá Árant Hansen í Gøtugjógv og Jógvan Páll í Bartalsstovu greiður frá at vatni rennur út úr fjallinum og tað rennur altíð sama mongd og vatnið er altíð 6 hitastig, og tað renna 25.000 litur um døgnið.

Nú Jógvan Páll hevur verið nakað runt í Danmark og gjørt royndir at selja, ja so hevur hann eisini fleiri váttanir frá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni við sum vátta at hetta er gott vatn, og tað skilst at longu í 1991 eru kemiskar og bakteriologiskar royndir tiknar av vatninum við góðum úrsliti ella sum tað stendur, "denne prøve har meget god bakteriologisk kvalitet" og víðari verður sagt at neyðugt er við fleiri royndum til tess at siga um kvaliteturin altíð er á so høgum støði.

Og royndir eru so eisini tiknar av vatninum í 2002 og úrslitið er tað sama.

### 250 sløg

Viðvíkjandi spurninginum hvussu gingist hevur at selja og hvørjar vónirnar eru, sigur Jógvan Páll í Bartalsstovu, at ikki er lætt at koma inn á danska marknaðin, tí vatn er nógv at fáa — eini 250 sløg eru longu á marknaðin, men eg ivist ikki í at tá fyrst vatnið er marknaðarført, verður tað keypt, metir hann.

- Tað tekur drúgva tíð at arbeiða eitt merki upp, sigur Jógvan Páll í Bartalsstovu at enda.

Áðrenn Jógvan Páll fer avstað bjóðar hann mær 2 fløskur — sodavatnsfløskur — av hesum dýru og góðu dropum, og tá eg sjálvur eri komin til hús aftur og havi kølt vatnið nakað niður smakki eg hesar urgomlu og lívgevandi og vælkendu dropar og má sanna, at einki er sum føroyskt kelduvatn.

# Stokeranlegg til vanliga húsarhaldið


*Ingi Andreasen í vøruvogninum á veg til Norrønu.*

**Stokeranlegg verða nógv brúkt í londunum uttan um Føroyar og nú ætlar Ingi Andreasen í Fuglafirði at vita um áhugi er fyri teimum eisini í Føroyum**

OR&MYND
*Ólavur í Beiti*

**Danland í Blokhus:** Ingi Andreasen í Fuglafirði sum hevði El-Køli og Frysti verkstaðin El-Innbúgv Service kom til Danmark bæði at halda summarfrí á Danland í Blokhus og eisini við dóttrini sum skuldi undir lesnað í Aalborg.

Men hann hevði eisini aðrar ætlanir, og tá eg gangi framvið vøruvogninum, sum hann er við at fylla tí hann skal heim við Norrønu, greiðir hann mær frá at hann eisini hevur kannað tey sonevndu Stokeranleggini. Ingi Andreasen hevur gjørt sítt heimaarbeiði, tí longu undan ferðini higar til Danmarkar hevur hann verið í samband við eitt knúsivirki í Funningsfirði, greiður hann frá.

### Brenna bollar

Eg skilji ikki rættiliga, hvat Ingi Andreasen meinar við, tá hann tosar um silo, terningar, plattar, tablettir, men tá hann so vísir mær eina mynd av einum ketli og einum brenniovni, sum er settur til ketilin, skilji eg, hvat talan er um.

Ingi Andresen hevur ætlanir um at eisini geva føroyingum møguleikan at brenna og spara í olju við sonevnda Stokeranlegginum. Og á myndini av eini uppseting av Stokeranleggi og ketli sæst at tað væl ber til tá vit júst í Føroyum ofta hava stóran kjallara í sethúsunum. Ein silo verður sett til ketilin – ein brenniovnur, Stokeranlegg – og jú meiri hon verður brúkt at brenna í, jú minni brennur oljufýringin, so einkult er tað.

### Ymiskar støddir

Og tú kanst fáa ymiskar støddir av anlegginum, siloini, úr 25 kilowatt og upp í fleiri hundrað kilowatt.

– Men tú kanst ikki tveita alt í Stokeranleggið, sigur Ingi Andreasen, tað ber ikki til. Brennið verður keypt, men tað er so altíð bíligari enn oljan. Og Ingi Andreasen hevur so eisini ætlanir um at fáa sær eitt knúsivirki so hann kann framleiða brenni.

Og mannagongdin er so tann, at plattar og annað burturkast av ymiskum slagi verður knúst til molar, terningar ella bollar og so brent í siloini.

Vanliga verða Stokeranlegg brúkt á skúlum, ítróttarhallum, sjúkrahúsum og øðrum stórum bygningum, men Ingi Andreasen hugsar eisini um vanliga húsarhaldið. Og tølini tala fyri seg at her eru pengar at spara um tú hevur eitt Stokeranlegg í húsunum.


*Bartholin Thomsen eitur nýggi stjórin á Cafeteria í Vandland. Hann hevur bert starvast í ein mánaða so ikki allir føroyingar sum vitjaðu Danlanmd í Blokhus hava hitt Bartholin. Men hann hevur verið í Føroyum og starvaðist í Mjørkadali eitt ár, hetta var í 1969. Og í frítíðini arbeiddi hann eisini — ikki dønum ólíkt — í Føroya Keypsamtøku í Havn*